

*mynd: Dagfinn Olsen*

Parkina. Og hann var eisini komin, hóast sjúku og takkaði læknanum, ið hevði givið honum stóra sproytu í endan, so hann kom fyri seg.

Og allan vegin millum løgini undirhelt entertainarin Williams.

Og tað var sanniliga eitt tyssi av hittum, ið rungaðu í donsku summarluftini; Millennium, Back for good, og Feel, fyri at nevna nøkur. Og eisini hevði hann ein viðsangara á palli og saman nærkaðust teir swingtónleikinum eina løtu, nakað, ið eg hevði vónað, og tað riggaði.

Og tó at tað ikki var heilt frítt, at Robbie var heilt greiður yvir, at har stóðu eini 70% av fólkinum í eginleika av forelskaðum konufólki, so var hann góður á palli. Men sjálvandi spældi hann uppá hetta, sum t.d. tá hann ”uppdagaði” eitt hol í buksunum framman har lørini hittast. Og meðan hann gjørdi vart við tað, greiddi hann frá, at tvinnir vóru kostirnir, antin at halda fram ella at fara av pallinum at finna einar nýggjar buksur....

Og sjálvandi rópti fjøldin, at hann skuldi ongan veg fara, men syngja og undirhalda í júst hesum buksunum.

## Williams og Schmeichel

Og hóast góða konsert við eisini rúgvu av hittum og góðari framførslu, so gjørdust fólk bilsin, tá Robbie kunngjørdi, at ein gestur nú kom á pall; He is a great dane. He is a fucking legend...

Og mín sann. Á pallin í Parkini kom ongin annar enn Peter Schmeichel og ein hugsaði, at hvat kundi fótbóltsglaði Robbie nýta hann til í hesum høpinum?. Skuldi hann eisini sparka áskrivaðar fótbóltar út í mannamúgvuna, eins og Robbie hevði gjørt fyrr í konsertskránni?.

Men so var als ikki, tí Schmeichel sessaðist við tangentarnar og eyðkendu tónarnir í lagnum Feel hoyrdust!!!

Jú mín sann. Ein kann ikki annað enn undrast, hóast lítli djevulin aftast í tilvitskuni alla tíðina gjørdi vart við, at helst sat onkur annar aftanfyri leiktjaldið og spældi fyri hann og í minsta lagi var helst onkur annar leikari, ið stóð til reiðar, um hetta nú fór heilt av kós.

Men tað var eftir øllum at døma Schmeichel, ið spældi, og hví skuldi hann ikki tað? Og hann kom væl frá tí.

## Let me entertain you

Nú var tyssið við hittum hentað og fólkið kravdi eykaløg, eftir at Robbie hevði takkað fyri seg og takkað pápa sínum, sum taldist millum lurtararnar hetta kvøld.

Let me entertain you, Angels og Kids ljómaðu og Robbie fann ein lítlan drong í fremstu røð, og mammu hansara, og beyð teimum upp á pallin at vera, meðan hann avgreiddi síðstu løgini. Og fegin og kensluborin tóktust tey at njóta hvørt sekund.

Robbie hevði sagt; Let me entertain you, og tað gjørdi hann, so tað stóð eftir í.

Fin konsert við Robbie, ið bara tykist vinna meira og meira, tá umræður unga popparan úr Take That, ið nú er ein rættur gentlemaður, ið ferð eftir ferð prógvar, at hann dugur síni ting. Hann er ikki bara ein sangari, hann er entertainari, og tað er sum kunnugt eitt lítið sindur meira, enn tey flestu við góðari samvitsku kunnu skriva á sítt kort.

## FAKTA



### Robbie Williams í stuttum

**Fødder í Bretlandi tann 13. Februar 1974.**

**Byrjaði sololeiðina í 1996.**

**Áðrenn tað limur í drongjabólkinum Take That. Ein av fimm limum í bólkinum. Sagt verður, at Robbie hóskaði ongantíð í heildini í bólkinum, m.a. tí hann rætt og slætt var "harðari" enn hinir. Tað kom tí ikki óvart á , tá hann í 1996 fór úr bólkinum fyri at royna seg á egnum beinum.**

**Hóast heldur tunga byrjan, so byrjaði at gangast betri í 1997, tá hansra fyrsta veruliga fløga kom út. Av fløguni er m. o. lagið Angels kent.**

**Í 1998 gongst betri og betri og í somu takt flytir Williams seg mótvegis klassiska bretska gentleman útsjóndini - a la James Bond, og statur vil tá eisini verða við, at hann er upp á tal sum ein komandi James Bond leikari.**

**Seinni syngur Robbie eisini jazz og swing og m.a. synger hann løg hjá Sinatra.**

**Í dag hevur hann staðfest seg millum teir fremstu á heimspallinum, bæði sum sangsari og entertainari.**

**Fløgur: (solo)**
**Life Thru A Lens (Chrysalis - 1997)**
**I've Been Expecting You (Chrysalis - 1998)**
**Sing When You're Winning (Chrysalis - 2000)**
**Swing When You're Winning (Chrysalis - 2001)**
**Escapology (RW / Chrysalis - 2003)**
**Live Summer 2003 (Live) (Chrysalis - 2003)**
**Greatest Hits (samling) (Chrysalis - 2004)**
**Intensive Care (EMI - 2005)**